# Methandil í Danmark

Størsti handilin millum tvey donsk feløg gjørdist veruleiki, tá FC Midtjylland um vikuskiftið keypti 23 ára gamla Jonas Borrgin úr OB. Nøkur upphædd verður ikki upplýst, men donsku miðlarnir eru á einuim máli um, at talan er um methandil. Og samstundis verður sagt, at FCM við hesum veruliga hevur lyft seg eitt pláss upp í danska fótbóltshierarki'num. – Við hesum seta vit eisini handling handan orðini um, at vit vilja vera ein konstantur faktorur í toppinum av donskum fótbólti, sigur Thomas Thomasberg, høvuðsvenjari, í tíðindaskrivi, sum er sent donsku fjølmiðlunum.



# Símun spælir í kvøld

Í Íslandi varð eingin fótbóltur spældur um vikuskiftið, men í kvøld er fult umfar á skránni. Tá taka Keflavík og Símun Samuelsen ímóti Fjølnir, sum undan hesum umfarinum er á fjórða plássinum í íslendsku Landsbankadeildini. Keflavík er á odda í deildini við 18 stigum fyri fyrstu sjey dystirnar.

# Spældu seg í stevnuhýr




*Martin Tausen leggur her VB/Sumba á odda 2-1, og so kundi stevnuhýrurin veruliga bjargast við einum trivaligum sigri á NSÍ*

*Mynd: Talgilt*

**VB/Sumba fór avstað við jóansøku steypinum, og nú standa tvær stórar avbjóðingar á útivølli fyri framman**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Nógva heimafólkið á Vágseiði fekk ein skelk fyrstu løtuna, tá ið VB/Sumba í jóansøku dystinum hevði vitjan av teimum næstbestu hjá NSÍ.

Pætur Klein á Líknargøtu legði NSÍ á odda, og lítla løtu seinni hevði NSÍ bóltin á træverkinum aftanfyri Bjarna Johansen. So fótaði heimaliðið sær. Birgir Jørgensen, sum við tveimum málum gjørdist dagsins maður, skoraði til 1-1, og tá ið Martin Taunsen tveir minuttir undan hvíldini hevði skorað til 2-1, var eingin ivi um, hvønn veg tað bar. Fyrstu løtuna eftir steðgin varð alt avgjørt. NSÍ misti ein mann orsaka av hevnisøku, og miðvallarin Marner Tausen økti til 3-1.

Nú skal VB/Sumba spæla bæði á Argjum og í Sørvági.

Hesa ferð Jón Krosslá Poulsen ikki millum málskjúttarnar hjá VB/Sumba, men hann og liðfelagarnir gleða seg til torføru avbjóðingarnar, sum standa fyri framman:

- Tá ið vit høvdu fótað okkum, spældu vit væl. Leygardagin skulu vit norður á Argir at spæla. Har er altíð torført at vinna. Vit spæla hvørja ferð fyri at fáa øll stigini, men tað kann ikki útilokast, at vit verða nøgdir, um vit fáa eitt stig við av Argjum, sigur Jón Krosslá Poulsen hjá VB/Sumba.

Eftir at hava spælt ímóti AB og B68 í Vági skal VB/Sumba spæla í Sørvági. Talan er sostatt um tveir lykladystir innan stutta tíð.

Hini trý oddaliðini vunnu hesa ferð øll á útivølli. Allan Mørkøre var trífaldur málskjútti í Streymnesi, har AB vann 6-0. Merkisvert var tað, at eingir av teimum, sum kappast um pláss á besta liðnum hjá EB/Streymi, hjálptu til leygardagin.

Bæði á Svangaskarði, har TB vitjaði, og í Klaksvík, har 07 Vestur vitjaði, var talan um tættar uppgerðir, sum kortini endaðu við trivaligum sigrum til gestirnar.

Umframt tey fýra, sum hava møguleika at flyta upp, var tað bara eitt annað lið, sum syrgdi fyri fullari úrtøku. Tað var HB, sum á heimavølli vann tætta uppgerð ímóti Víkingi 2-1. Har vórðu tveir spælarar vístir av vølli – ein frá hvørjum partinum. Umframt hesar báðar og NSÍ spælaran, sum varð útvístur á Vágseiði, var eisini ein hjá EB/Streymi útvístur. At fýra síggja reytt í einum umfari er rættiliga nógv.

## FAKTA um 1. deild

**12. umfar**
**Leygardagin 21. juni**

**VB/Sumba-NSÍ 5-2 (2-1)**
**0-1:** Pætur Klein á Líknargøtu 20.
**1-1:** Birgir Jørgensen 33.
**2-1:** Martin Tausen 43.
**3-1:** Jónar Dahl 56.
**4-1:** Dan Djurhuus 70.
**5-1:** Birgir Jørgensen 81.
**5-2:** Sonni L. Petersen 88.
**Reytt kort:** Eddie Mikkelsen, NSÍ, 52.

**HB-Víkingur 2-1 (1-1)**
**0-1:** Sonny Dalheim 18.
**1-1:** Rani Christiansen 45.
**2-1:** Jóan Magnus Dalbø 56.
**Reytt kort:** Meinhard Joensen, Víkingur, 45. og Ingvard Vang, HB, 60.

**KÍ-07 Vestur 2-4 (1-1)**
**0-1:** Tór-Ingar Akselsen 6.
**1-1:** Gunnleif Biskopstø 8.
**1-2:** Andrzej Stretowicz 57.
**1-3:** Jens Erik Rasmussen 75.
**2-3:** Steffan Kalsø 83.
2-4: Jovan Panic br 90.

**B68-TB 0-3 (0-1)**
**0-1:** Óli Johannesen 25.
**0-2:** Oliver Abrhamsen 60.
**0-3:** Johan E. R. Mouritsen 75.

**EB/Streymur-AB 0-6 (0-4)**
**0-1:** Thomas Hans Rubeksen 3.
**0-2:** Allan Mørkøre 8.
**0-3:** Allan Mørkøre br 32.
**0-4:** Kenneth Jacobsen 34.
**0-5:** Allan Mørkøre 47.
**0-6:** Thomas Hans Rubeksen 75
**Reytt kort:** Bartal Hermansen, EB/Streymur 30.

# Sagt í 3. hálvleiki

**Ein partur av triðja hálvleiki á Rás2 eru SMS-boð frá lurtarunum. Í tann mun at tíðin røkkur, verða hesi boð lisin upp í sendingini. Og bestu SMS'ini verða eisini prentað í mánadagsútgávuni av Sosialinum**

»*.. klokkureint fríspark til Rodrigo beint adrenn eb/streyma malid!!*«

»*Hvør er Rodrigo*«

»*Ropti eb/streyma fjepparar petur/ streymur ella eb/streymur aftana dystin?*«

»*Tad lidi sum skoradar flest màl er tad besta lidid! Tad vil siga EB/ streymur er tad besta lidi*«

»*Vit kunnu ikki gera vid at vit vunnu aftur i dag,vit hava simpulthen bara tad betra lidid... og so hans paua sjalvandi...flott ebstreymur!*«

»*Ja, vit mugu nokk keypa Dagfinn ein vekjara, forsova seg à aljòsum degi, tillukku B68-dreingir. Tit vòru super-raskir ì dag, ein fann av Nesi.*«

»*Tad er fantastiskt at bara ein dòmari ger ein feil, so blivur hann rakkadu nidur.. vit skulu verda glad fyri at dòmarar tima at bliva vid at døma.. sjalvt um teir faa nògv yvir seg. Annars er tad skomm at bliva 15 min forseinur at døma ein dyst. Gott at vit vunnu à Vikingi i dag!*«

»*Sitat fra ROY KEANE ur The Telegraph, 10. August 2001: "Domarar hava eitt hart arbeidi, og teir gera tad gott. Høvdu okkara mistøk verid blast upp, einsns og teirra... HARRA GUD!"og teirra... HARRA GUD!"*«